# Vunnu norðurlendska filmskapping

**Næmingar á Tekniska skúla í Klaksvík hava fyrrapartin vunnið stóra norðurlendska filmskapping í sambandi við veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn**

FILMSKAPPING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað var ein stórur sigur fyri næmingar á Tekniska skúla í Klaksvík, tá teir í morgun vunnu eina norðurlendska filmskapping fyri ungfólk.

Kappingin, sum kallast Reclimate, var fyri ungfólk í aldrinum 15 til 19 ár, og tveir bólkar av Tekniska skúla í Klaksvík vóru við í kappingini. Samanlagt komu 125 stuttfilmar til kappingina, og hesir filmar skuldu vísa avleiðingarnar av Co2 útlátinum.

Annar av bólkunum var valdur út millum teir 8 finalufilmarnar, og tá ið ein serlig dómsnevnd í morgun kunngjørdi vinnaran av kappingina, var tað filmurin The Burden, sum næmingar á Tekniska skúla í Klaksvík hava gjørt.



*Vinnandi filmurin er tikin upp í vakra umhvørvinum Úti í Grøv í Klaksvík*

Teir tríggir næmingarnir í bólkinum eru Jákup Klein, Jóannes Martin Johannesen og Hermann Mørkøre.

Dómsnevndin sigur um vinnandi filmin, at hann er flottur og hevur ein sterkan boðskap um, hvussu ættarliðini lata hvørjum øðrum umhvørvistrupulleikarnar.

Virðislønin til vinnandi filmin er 2000 evrur.

BILIN finnur tú hjá okkum




Vit hava fult hús av brúktum bilum:
- góðar og lítið brúktar
- bíligar og nógv brúktar

Bilafígging
einans 25% í útgjaldi

Auto Service
www.autoservice.fo

Sosialurin / KvR 34 18 00

Bygningur í Vestmanna til sølu




- Bygningurin er Inni á Fjørð í Vestmanna
- 2 ferðir 40x20 mtr til støddar
- Hevur 2 skrivstovuhøli
- Kaffistovu og køk
- 2 toilettrúm
- Bygningurin er bjálvaður

Áhugaði kunnu venda sær til Vónina, Hjalmar Petersen á tlf 214392, 474210 ella við telduposti til hjalmar@vonin.com

VÓNIN




SOUSCHEFUR TIL NORRÖNU

Søkt verður eftir souschefi til galluna umborð á Norrönu at byrja 1. februar 2010.

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi arbeiði sum souschefur í einum altjóða umhvørvi.

**Vit vænta, at tú:**
- ert kreativur, lagaligur og hevur ábyrgdarkenslu
- hevur hug og evni at arbeiða saman við øðrum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- ert fleksibul og hevur gott sinnalag
- ert útlærdru gastronomiskur kokkur

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og krevjandi starv á einum stórum og fjølbroyttum arbeiðsplássi
- góðar umstøður og gott arbeiðsumhvørvið
- góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning
- arbeið og frítíð í lutfallinum 1 til 1

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt í samráð við Chef Manager.

Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

Umsóknir og CV skulu sendast við telduposti til hesa tilskrift innan mánadag 30. desember:

chef.manager@norrona.fo
Tel. 344850 / 344835

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini aðalsøluumboð í Bretlandi, Beligu, Fraklandi, Hollandi, Italiu, Pólandi og Svøríki. Smyril Line hevur eisini tætt samstarv við samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SMYRIL LINE · YVIRI VIÐ STROND 1 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.FO